## Fekk kreppupakka

Leiðararnir í ES og evrulondunum samdust í gjárkvøldið um at lata Grikkalandi ein hjálparpakka, men tað sermerkta við pakkanum er, at hann skal helst ikki koyrast upp. Londini eru samd um, at Grikkaland skal fáa hjálp, men tey vilja helst sleppa undan at gjalda. Ístaðin fyri samdust tey um, at grikska stjórnin skal fáa Altjóða Gjaldoyragrunnin at fíggja mest møguligt av landsins tørvi. Tað, sum restar í, kunnu grikkar so læna frá nøkrum ES-londum. Grikski forsætisráðharrin, Georgios Papandreou, var væl nøgdur við úrslitið av fundinum.



## USA sigur enn nei

Nir Hefez, sum er annar talsmaðurin hjá ísraelska forsætisráðharranum, Benjamin Netanyahu, mundi hava misskilt okkurt, tá hann í morgun segði, at USA fer ikki at gera meiri við ísraelsku avgerðina at byggja 1.600 íbúðir í Eystur-Jerusalem. Løtu seinni kom hin talsmaðurin, Mark Regev, á skíggjan og segði, at USA hevur ikki góðkent avgerðina um at byggja tær 1.600 íbúðirnar. Benjamin Netanyahu hevur sagt, at avgerðin hjá stjórnini verður ikki broytt, hóast ST, ES, USA og Russland vilja hava stjórnina at taka avgerðina aftur.



Gull-Britt Hansen og Hanna Magnusson skriva í MESS



Aron Isaksen arbeiðir hjá Tutl



Ásla og Asta starvast á Ørkini í Íslandi



Sára Petersen arbeiðir í Vero Moda

# Tvær vikur í starvsvenjing

**Vit hava tosað við nøkur úr 10. Flokki á skúlanum á Ziskatrøð, sum í løtuni eru í starvsvenjing.**

STARVSVENJING
*Orð&myndir: Tanja Sørensen/Durita Simonsen*

Sára Petersen er í starvsvenjing í Vero Moda, sum liggur í SMS.

Sára royndi trý onnur pláss, har hon ikki hevði møguleika at sleppa inn. Men hon angrar tó ikki, at hon valdi Vero Moda.

Tey hava spurt hana, um hon tímur at arbeiða har aftaná starvsvenjingina. Higartil hevur hon millum annað lagt klæðir uppá pláss, gjørt skiltir til vindeyga, latið einari dukku í klæðir og prísa.

Sára væntaði ikki, at tað fór at vera soleiðis at arbeiða har.

- Men eg eri glað fyri at vera her. Her er stuttligt at vera, sigur Sára Petersen.

### Í Íslandi

Vit hava eisini ringt til Ísland, har tvær gentur eru í starvsvenjing á Hotel Ørkini í Reykjavík.

Ásla og Asta valdu Ørkina, tí tær vildi royna okkurt nýtt og longdust eftir góðum veðrið.

Tær hava higartil havt morgunvakt, hava ruddað, vaskað, svara mail sum Ørkin fær og annað tílíkt.

Tær hava eisini hugnað sær eitt sindur. Har er ikki nógv fólk í løtuni.

Tær høvdu hvør sína meining um, at halda áfram við starvinum. Onnur hevði væl tímað at hildið fram, av tí at har er stuttligt og tí at hon kom at kenna nýggj fólk.

Hin hevði ikki hugsað sær at hildið áfram. Ørkin var kortin júst tað, sum tær væntaði at tað fór at verða.

### Fløgur

Vit stukku eisini inn á gólvið í fløguhandlinum 'Tutl', har vit hittu Áron Isaksen, sum sat og hugnaði sær við kaffi og øðrum leskiligum.

Áron valdi fløguhandilin av tí at hann hevur stóran áhuga fyri tónleiki Hann hevur sett fløgur uppá hillarnar, sitið við kassan og prísað.

Aron hevði væl hugsað sær at hildið fram við hesum starvi í nærmastu framtíð. 'Tutl' var tað hann hevði væntað.

### Skriva

Inni í 'Mess' sótu Gull-Britt Hansen og Hanna Magnusson og skrivaðu eina grein um kærleika.

Tær valdu at fara í praktik í 'Mess', tí at tær hildu at tað ljóðaði áhugavert og spennandi, og so sluppu tær eisini at royna seg innanfyri journalistikkin.

Tær hava higartil skrivað greinar inn á heimasíðuna hjá 'Mess', og hava gjørt eina kanning um religión.

Vit spurdu um hetta var nakað sum tær høvdu tímað at gjørt seinni í lívinum. Tær hildu, at tað var áhugavert, men ikki nakað ið tær tímdu at gera hvønn dag.

Hetta var eisini tað sum tær høvdu væntað.